# Vælkomin á vitjan!

Fyritøkur og arbeiðspláss eru vælkomin at vitja okkum við ymsum endamálum, eitt nú teambuilding, seminar, kundarøkt ella incentive.

Hjá okkum finna tit tænastustøðið, nærlagnið og veitingartrygdina, sum Sólorka er gitin fyri. Vit hava eisini innihaldið og aktivitetirnar, sum gera vitjan tykkara til eina ógloymandi uppliving. Í samráð við tykkum skipa vit vitjan tykkara, so tit fáa júst tær avbjóðingarnar og ta javnvágina millum gaman og álvara, sum tit ynskja tykkum.

### Íkast og íblástur

Vit hava vinir og kenningar innan vinnu, ítrótt, list o.a., sum kunnu ríka vitjan tykkara við at geva síni íkøst til skeið, teambuilding ella kundarøkt tykkara, um tit hava áhuga.

### Upplivingar og adventures

Harafturat kunnu tit velja millum eina rúgvu av adventures, avbjóðingum, útferðum og tiltøkum, sum tit kunnu lesa um á næstu síðunum.

### Matmentan, matgerð og kappingar

Harafturat kunnu tit velja millum eina rúgvu av adventures, avbjóðingum, útferðum og tiltøkum, sum tit kunnu lesa um á næstu síðunum.

### VIP og vælvera

Hava tit harafturat hug til ordiliga at forkela starvsfólk, kundar ella onnur, kunnu tit eisini lesa meira um møguleikarnar fyri tí.

www.solorka.fo • solorka@solorka.com • tlf. 221090



## Gisting – fínt ella rátt?



Einki kann sum matgerð og góðar máltíðir sjóða okkum saman. Maturin er tí sera vælegnaður bæði sum uppliving og sum grundarlag undir teambuilding og samstarvsmenning.

Her á Costa Blanca hava vit eina ríka matmentan, sum er grundað á fyrstafloks rávørur úr bæði havinum og landbúnaði.

Okkara miðjarahavs-kostur byggir harafturat á sterka siðvenju, gransking og professionalismu. 11 matstovur í øki okkara hava tilsamans fimtan Michelin-stjørnur – ein teirra hevur ikki færri enn tríggjar.

## Matmentan, matgerð og kappingar